# Matur 20% dýrari

Kanningin hjá Hera á Rógvi vísur, at tað er sum heild, at bæði vørur og tænastur eru dýrari í Føroyum enn í Danmark.

Eini 45% av allari nýtslu hjá einum húsarhaldi eru tænastur av ymsum slagi og 55% eru matur og aðrar ítøkiligar handilsvørur.

Í Føroyum er matur og aðrar vanligar gerandisvørur 20% dýrari at keypa enn í Danmark.

Og fjarskiftið er serstakliga nógv dýrari í Føroyum enn í Danmark, tí á hesum øki er prísmunurin heili 45%.

Hinvegin vísir kanningin eisini, at aðrar vørur, enn matur, eru 14% dýrari í Føroyum enn í Danmark og býli er eini 30% dýrari enn í Danmark.

Somuleiðis eru renturnar í Føroyum nógv hægri enn í Danmark.

Summar vørur og tænastur eru eisini bíligari í Føroyum enn í Danmark, eitt nú at fara tannlækna, bara fyri at nevna eitt dømi.

- Men ein orsøk til tað kann eisini vera, at tá ið alt annað er goldið, er ikki so nógv eftir til tannlæknar og aðrar tænastuveitingar av ymsum slagi.

Hinvegin er brennievni til bilar og hús eisini væl bíligari í Føroyum enn í Danmark. Talan er um ein prísmun upp á 17-22% til okkara fyrimun og tað er nakað, sum merkist í heildarmyndini.

### Avgjøld gera munin

Tað, sum ger brennievni nógv bíligari í Føroyum, er, at ein stórur partur av samlaða prísinum, er avgjøld av ymsum slagi, sum tað almenna krevur.

- Í Føroyum eru avgjøldini nógv lægri enn í Danmark. Og verða prísirnir ruddaðir fyri avgjøld, er tað ógvuliga ivasamt um prísurin á brennievni tá hevði verið bíligari í Føroyum, enn í Danmark.

Men í hesum sambandi kann leggjast afturat, at samgongan hevur í umbúna at leggja umhvørvisgjald á brennievni, so tann munurin fer eisini at minka nokk so fitt.

Hinvegin hava vit heldur ikki ognarskatt í Føroyum,men tað eru eisini røddir frammi um tað, ikki so nógv frá politiskari síðu - enn í hvussu so er. Higartil eru tað mest búskaparfrøðingar, sum hava talað fyri at seta ognarskatt í verk í Føroyum.



# Lægri prísir skapa vælferð

At halda prísunum á vørum og tænastum niðri, er ikki bara ein stórur vinningur fyri hvønn einstakan brúkara.

– Tað er eisini ein stórur vinningur fyri handils- og tænastuvinnuna. Men tað er sanniliga eisini ein stórur vinningur fyri samfelagið alt.

– Lágir prísir skapa hægri vælferð, staðfestir Heri á Rógvi, búskaparfrøðingur í kanning síni um prísleguna í Føroyum og í Danmark.

Hann sigur, at lækka prísirnir í Føroyum, merkir tað, at samfelagskakan verður størri.

- Tí føra lægri prísir til ein størri búskap. Verður hugsað um krónur og oyru, er nýtslan hjá hvørjum einstøkum nokk so støðug. Lækka prísirnir á einari vøru, verður bara okkurt annað keypt ístaðin, sigur Heri á Rógvi.

Hann sigur, at munurin er bara tann, at eru prísirnir høgir sum heild, fáast færri tænastur og færri vørur fyri pengarnar. Eru prísirnir hinvegin lágir, fáast fleiri vørur og tænastur fyri peningin.

- Og verður okkurt keypt bíliga í internetinum, verður bara okkurt annað keypt í handlinum ístaðin.

- Ein vanligur føroyingur brúkar í meðal 88%-89% av síni tøku inntøku, men hann væntar, at tá ið nýtslan hevur stabiliserað seg, fer talið at liggja uppi á 94%-95%.

- Spurningurin er bara, hvussu nógvar vørur og tænastur brúkarin fær.

- Tí er tað avgerðandi, at prísirnir lækka og tí er tað somuleiðis avgerðandi, at vit eru tilvitað um, hvørja ávirkan og hvørjar avleiðingar ymiskir príspolitikkur hevur á samfelagið, heldur Heri á Rógvi.

### Sterkt kappingareftirlit

- Nettupp í støðuni, sum er galdandi á føroyska marknaðinum, hevur tað sera stóran týdning at hava eitt sterkt og virkisført kappingareftirlit. Men tað hava vit so heldur ikki í Føroyum, tí tað er so veikt, at tað megnar lítið og onki.

Hann staðfestir, at í Grønlandi og í øðrum smáum samfeløgum hava tey lagt stóran dent á at hava eitt sterkt kappingareftirlit, tí tey duga at síggja, hvussu stórur samfelagsligur vinningur er í at halda prísunum so niðri og at tað tí er ein úrtøka fyri samfelagið.

# Reka fólk av landinum

Heri á Rógvi er sannførdur um, at høga príslegan í Føroyum ávirkar flytimynstrið hjá fólki.

Hann ivast ikki í, at príslegan bæði fær føroyingar at flyta av landinum og forðar útisetum í at flyta heim.

Príslegan í einum landi ávirkar hvørt tað einasta menniskja og hevur sera stóra ávirkan á, hvussu stór samfelagsliga kakan er.

Heri á Rógvi sigur:

– Eg sigi ikki, at prísirnir í Føroyum eiga at vera líka lágir sum í Danmark, tí tað kunnu vera viðurskifti, sum ávirka teir skeiva vegin, eitt nú flutningskostnaðurin.

– Men eg ivist heldur onga løtu í, at prísirnir í Føroyum kundu verið lægri enn teir eru nú.

- Tá ið livikorini í Føroyum so versna niður um eitt ávíst mark, flyta fólk bara av landinum fyri at fáa tað betri.

- Men tað ber eisini til at siga tað soleiðis, at teir høgu prísirnir eru somuleiðis ein forðing fyri, at útiasetar flyta heimaftur, tí tað er alt annað enn lokkandi at flyta til eitt land, har mann følir seg verða knokkroyttan.

### Meiri tilvitað

Heri á Rógvi heldur, at politiski myndugleikin eigur at lýsa viðurskiftini gjølliga og at taka støðu til, um hetta eru viðurskifti, sum eru so grundleggjandi, at tað er rætt, at politiski myndugleikin skal hava rætt at ávirka á tey.

- Einskiljingar eru ikki endaliga loysnin upp á alt, tí tað førir ikki automatiskt til nakra kapping - serliga undir teimum umstøðum, sum føroyski marknaðurin er skipaður við einum, tveimum, ella heilt fáum stórum veitarum á vísum økjum.

Hinvegin heldur hann, at tað er bara í nøkrum førum, at almennar reguleringar rigga.

– Men í øllum førum eiga vit at gera meiri við at gera fólk meiri tilvitað um, prísleguna á ymsum vørum og tænastum

Heri á Rógvi heldur, at einskiljingarnar, sum eru gjørdar, hava verið lutfalsliga skilagóðar.

Men hann saknar eina meiri nágreiniliga kanning av, hvørja ávirkan einskiljingar fáa á ymsar bólkar í samfelagnu.

– Tað er neyðugt at fara við tí fína kambinum og eg haldi ikki, at viðgerðin hevur verið serliga djúptøkin av teimum einskiljingunum, sum eru framdar.